# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*– Kyndilsleikararnir, sum eru á landsliðnum, kunnu heilt víst vænta sær leikbann frá landsliðnum, og allir leikararnir fara at fáa somu revsing*

*Birgir Hansen, landsliðsvenjari*

VÍF-StÍF:

## Brak í Vestmanna

**Satt brak verður í oddinum av Atlantic Airways deildini, tá bæði oddaliðini møtast í Vestmanna. Her tekur VÍF ímóti StÍF**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*




*VÍF tekur ímóti StÍF í bestu mansdeildini sunnudagin í einum sannum oddabrakið.*

VÍF hevur ikki verið til at steðga síðstu dystirnar av grundspælinum. Eftir eina heldur trilvandi byrjan, har teir bert fingu trý stig í fyrstu trimum dystunum, so hava teir veruliga funnið stevið. Síðstu 7 dystirnir endaðu allir við sigri til VÍF, sum má metast at vera greiðasta boð uppá eitt komandi meistaralið.

StÍF er einasta liðið, sum so hampiliga hevur megnað at hingið í VÍF í oddastríðnum. Teirra trupulleiki í ár hevur bara verið, at teir hava leikt ov nógvar javnleikir. Av teimum 10 dystunum í grundspælinum leiktu teir heili 4 javnleikir, og hetta hevur givið VÍF møguleikan at leggja seg klárt á odda í Atlantic Airways deildini hjá monnum.

### Nú er eingin munur

Leiðslan, sum VÍF hevði vunnið sær í grundspælinum, er nú hálverað. Endaspælið fer á rull sunnudagin, og hetta gevur hinum liðunum í deildini ein nýggjan møguleika at draga inn á oddaliðið úr Vestmanna.

Ikki minst StÍF hevur nú møguleikan at taka VÍF aftur, tí vinna teir dystin sunnudagin, so leggja teir seg ájavnt við VÍF í oddinum. Vinnur VÍF hinvegin dystin, so verður munurin stórur niður til næstu liðini.

Hesi bæði liðini hittust eisini tvær ferðir í grundspælinum. Fyrri dysturin, sum var á Skála, endaði við javnleiki. Hetta var fyrsti javnleikurin í røðini hjá StÍF. Seinni dysturin var í Vestmanna fyri góðum mánað síðani, og tann dystin vann VÍF við trimum málum.

Sostatt hevur VÍF munin á StÍF, men hóast hetta, so kunnu áskoðarar vænta ein spennandi dyst. Bæði liðini hava nevniliga alt at spæla um í oddastríðnum.

Neistin-KÍF:

## Neistin skal hanga í oddinum

**Hjá Neistanum er kravið ein sigur fyri at halda fast í oddaliðunum, meðan KÍF má royna at koma longur upp eftir stigatalvuni**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Gongdin hjá Neistanum hevur verið heilt góð í ár. Teir liggja í løtuni á einum 3. plássi, og munurin upp til oddalið er bert 3 stig. Hjá KÍF hevur ikki gingið eins væl. Teir liggjá á fimta plássið, men vinna teir dystin ímóti Neistanum, so er bara eitt stig á muni millum hesi bæði liðini.

Í 2. umfari hittust hesi bæði liðini á fyrsta sinni hetta kappingarárið, og tá gjørdi Neistin bart og vann við heili 10 málum í Kollafirði. Í seinna dystinum gekst heldur betri hjá kollfirðingum, men enn einaferð dró Neistin longra stráðið í einum jøvnum og spennandi dysti.

Nú liggur triðji dysturin millum hesi bæði liðini fyri framman, og hesin dystur er samstundis fyrsti dysturin í endaspælinum hjá hesum liðum. Hjá Neistanum er umráðandi at vinna dystin fyri at halda fast í oddaliðnum. Hjá KÍF ræður eisini um at vinna dystin, tí vinna teir ikki, so er munurin helst blivin ov stórur upp til ovastu liðini.

Neistin-Stjørnan:

## Endaspæl byrjar við braki

**Neistin tekur ímóti Stjørnuni í fyrsta dystinum í endaspælinum í Sunset deildini hjá kvinnum. Vinnarin leggur seg einsamallan á odda í bestu kvinnudeildini**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Neistin og Stjørnan eru tey bæði liðini, sum hava myndað oddin í føroyskum kvinnuhondbólti síðstu árini. Kappingin millum hesi bæði liðini hevur verið sera hørð, og síðsta kappingarár vann Stjørnan meistaraheitið, meðan Neistin vann steypakappingina.

Aftur í ár berjast júst hesi bæði liðini um fremst plássini. Undan fyrsta dystinum í endaspælinum liggur Neistin á odda, og í hølunum á teimum liggur Stjørnan, sum bert er tað eina stigið aftanfyri Neistan.

### Hava vunnið ein í part

Gongdin hjá hesum báðum liðunum hevur verið góð í ár. Stjørnan byrjaði betur enn Neistin, og í 2. umfari eydnaðist teimum at vinna á heimavølli ímóti júst Neistanum. Eftir hetta gekst heldur striltið hjá Stjørnuna, meðan Neistin veruliga fekk vind í seglini. Neistakvinnurnar hava ongan dyst tapt síðani tapið fyri Stjørnuna, og fyrst í desember mánaða megnaðu tær at vinna á Stjørnuni, og sostatt vunnu tær seg eisini fram við Stjørnuni, sum lá á odda undan seinna dystinum millum liðini bæði.

Nú møtast liðini so aftur í fyrsta dystinum í endaspælinum. Vinnarin av dystinum leggur seg einsamallan á odda í bestu kvinnudeildini, og kanska vit fara at fáa eina ábending um, hvat av hesum báðum liðunum er tað sterkara í ár.

Dysturin millum Neistan og Stjørnuna verður í høllini á Hálsi sunnudagin kl. 14.30.